## DAGSINS MEINING

# Ein skiftispávi

Habemus papam - vit hava ein páva! Soleiðis ljóðaði rópið hvølt út yvir Pæturstorgið týskvøldið. Tað er yvirhøvur semja um, at týski kardivalurin Ratzinger, ið nú er valdur pávi, ikki kemur at merkja nakað slag av nýskipan. Tað verður heldur tvørturímóti so, at stríðið móti teimum nýskipanarhugaðaðu innan katólsku kirkjuna fer at verða hert. Ratzinger er ein harðrendur og sera konservativur kirkjumaður. Hann hevur í eini tjúgu ár staðið á odda fyri eini deild, ið hevur til endamáls at forða fyri broytingum innan katólsku kirkjuna. Í hesum virksemi sínum hevur hann ótroyttiliga barst móti hjúnaðarskilnaði, móti at geva katólskium prestum loyvi at gifta seg og í móti kvinnuligum prestum. Hann hevur verið hart ímóti tí sermerktu latínamerikansku katólsku gudfrøðini, ið hevur virkað fyri sosialum rættvísi og politiskum broytingum demokratiska vegin. Ratzinger er ímóti fyribyrgin og hann hevur enntá boðað frá, at rokktónleikur er verk hins ónda - her er við øðrum orðum talan um ein veruligan afturhaldsmann.

Vatikanið fer sostatt ikki bert fer at halda fram við kósini hjá Jóannesi Pálli sála, men katólska kirkjuleiðslan fer at herða hesa kós munandi. Aftan fyri hetta liggur ein djúpur ótti fyri broytingum. Katólska kirkjan er sum so mangar stovnur í hesum tíðum undir sera stórum trýsti. Støðan í triðja heiminum versnar, fátækdømið veksur og við hesum fylgir lógloysi og siðaloysi. Í vesturheiminum veksur átrúnaðarliga líkasælan í stórum pørtum av fólkinum, alt meðan nýggjar átrúnaðarligar røslur yvirtaka leiklutin hjá gomlu og etableraðu kirkjunum. Hetta rák er serstakliga hart í USA, sum er eitt sera týðandi øki í katólskum høpi. Í USA hava katólskur kirkjumenn stríðst dúgliga til tess at nútímansgera katólsku kirkjuna. Samstundis hevur katólska kirkjan í USA havt stórar gølur og nógvar trupulleikar at berjast við. Í hesi støðu hevur Ratzinger gjørt seg illa kendan í USA m.a. við at mæla til at nokta demokratiska forsetavalevninum Kerry altarsins sakramentið!

Tað er soleiðis lagt upp til enn meira stríð og enn størri polarisering og politisering av katólsku kirkjuni um allan heim. Hetta er mikið spell, tí henda kirkja hevur ómetaligt vald og ómetligan týdning í stórum parti av heiminum. Her hevði henda kirkja ein søguligan møguleika til at broyta seg og til at átaka sær ein leiðandi savnandi, etiskan og demokratiskan politiskan leiklut í eini spjaddari og ótryggari verð. Konklavan kundi havt valt ein mann úr triðja heiminum og harvið sent eitt signal til allan heimin - ein boðskap, sum segði, at katólska kirkjan nú fór í part við teimum kúgaðu, teimum fátæku og veiku. Men gomlu troyttu menninir vóru ov veikir og valdu tað trygga, verjuna móti broytingum. Men teir valdu samstundis ein skiftispáva! Við sínum 78 árum á baki er avmarkað, hvussu nógv Bænadikt hin 16. megnar at ávirka kirkjuna og heimin. Kanska verður skeið hansara skeiðið, har katólska kirkjan av álvara fer at fyrireika seg til eina verð við altjóðagerð, KT-kollvelting og ómetaligum politiskum og búskaparligum broytingum í Afrka, Asia og Latínamerika.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bedetid

**Michael Feldballe**

Ifølge den almindelige opfattelse, var det af praktiske årsager, Struensee i 1770 fik udarbejdet en forordning, der skulle udskifte en lang række religiøse dage med en enkelt dag: Dýri Biðidagur. Normalt bliver dette udlagt som en handling, der skulle afspejle den initiativrige tyskers ønske om, at effektivisere arbejdslivet og derved adskille arbejde fra de religiøse forpligtigelser. Dette har medført den i Danmark kendte tradition om varme hveder; hvedebrød der spises aftenen før helligdagen.

Med lagtingets lovforslag om, at bagere, kiosker og benzinstationer skal holde lukket mellem klokken 10 og 14 på helligdage, er der nu mulighed for, at de færøske bagere kan tage et nyt initiativ. Det kunne være "bag-selv" rundstykker, som forbrugerne kan købe lørdag, og så selv sætte i ovnen søndag formiddag. Så skulle muligheden for at debatten om den bede-tids korrigerede liberale lukkelov kan flytte fokus fra rundstykkerne.

Spøg til side. Lovgivning der utidigt blander politik og religion, er som en gammel ost: Uden fasthed og ilde lugtende. En liberal lukkelov der, støttet af religiøse eksperter, skal lovgive om at holde tankstationer og mindre butikker lukket mellem klokken 10 og 14 hver søndag og helligdage er uheldig. Den er et udtryk for utidig og dobbeltmoralsk sammenblanding af politik og religion. Den klæder hverken den seriøse politik eller den kristne tro, hvis dogme om at man skal komme helligdagen i hu, bliver til en diskussion om retten til at købe rundstykker.

De politikere der vælger at gå ind for denne regulering af den færøske borgers ret til selv at bestemme, bør tænke sig godt om. For hvad er det for en politisk tæft man derved viser fra lagtingets side. Man ønsker på den ene side at Danmark skal offentliggøre det færøske folks selvbestemmelsesret, der vil give betydning for landet i internationale fora. Og med samme hånd ønsker man at lægge et bånd på landets egne borgere, der skal regulere retten til at bestemme, hvad man ønsker at foretage sig og hvornår man ønsker det. Det er en uheldig udvikling for et samfund der ønsker at være demokratisk. Dette uanset at lovforslaget dækker sig ind under den færøske befolknings tradition for at komme hviledagen i hu.

Det er klart at landets politikere ønsker at gøre det bedste for landets borgere. Tænk bare: Hvad skulle være i vejen for, at næste skridt er bestemte spisetider for landets familier, for at bevare kernefamilien og give familien fred. For der kan da ikke være tvivl om, at mange færøske familier føler sig stressede eller føler at tiden ikke kan slå til i hverdagen. Alene de mange skilsmisser kan jo tyde på dette.

Alligevel kan målet med at forbedre enkelte personer liv eller redde potentielle familiers krise, ikke forsvare det middel man kunne benytte: At lovgive sig ud af problemerne ved at regulere det enkelte individs ret til at bestemme over eget liv og egne muligheder.

Nu er der ikke tale om regulering af spisetider, men derimod et formynderisk forsøg på at skabe de bedste forhold for "nogen" i det færøske samfund. Og som det allerede har været fremme i debatten omkring lovforslaget, så er der flere forskellige trossamfund i dette land. Derfor er politik der lovgiver for retten for de mange, tilsvarende en politik der uanfægtet undertrykker de få, og det er ikke de bedste demokratiske forhold i et samfund, der så brændende ønsker sig retten til selvbestemmelse.

Fakta: Iøvrigt er det en almindelig fejltagelse af betragte Struensee som ophavsmand for Dýri Biðidagur. Den blev indstiftet ved lov i 1686 på initiativ af Sjællands biskop Hans Bagger ene og alene af religiøst motiverede årsager.)

# Ikki fleiri rættleiðingar til Hans Paula Strøm

**Hergeir Nielsen**



Tá rættleiðingar ikki rína við landsstýrismannin, skal eg vara meg við at koma við fleiri av slagnum.

Seinasta frágreiðing løgtingsgrannskoðarana var fyri árið 2003, og tá ár fylgir ári, verður landsstýrismaðurin 2004 sjálvandi drigin inn í viðgerðina eisini.

Náttúrligt er, at sitandi landsstýrismaður fylgir gongdini á málsøkinum, har undanmaðurin slepti, men tá at hann alment tók sær heiðurin fyri øllum framabrotum á økinum, helt eg eina rættleiðing vera viðkomandi.

Tá landsstýrismaðurin hevur so mong onnur mistøkini at dragast við í hesum døgum, er einki at siga til, at hann eisini mistekur seg, tá ið hann í einari rættleiðing kunnar almenningin um, at bygdamaður og samgongufelagið hansara er formaður í løgtingsins grannskoðaranevnd.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.